# Bábelstornið

Hesin teksturin hóskar væl at siga ella lesa fyri næmingunum. Lærarin eigur at hava lisið tekstin frammanundan, so hann kann liva seg inn í søguna. Gott er, um nýggj og torfør orð ella máliskur verða gjøgnumgingnar í flokkinum, áðrenn teksturin verður lisin upp ella endursagdur.

Teksturin er ætlaður at skapa eina djúpa hugsavnan og innliving í søguna. Hetta kann lærarin kanska gera við at sløkkja ljósið, tendra eitt kertuljós og møguliga biðja óstillar næmingar blunda og savna seg um at lurta.

Í námsætlanini fyri kristnikunnleika og átrúnað er krav, at eftir 2. flokk skulu næmingarnir *duga at lurta eftir frásøgnum og søgum*. Hetta skal venjast. Best er, um spurningar, prát og annað virksemi bíðar, til lærarin er liðugur at lesa ella siga frá.

Niðast á hesi síðuni eru uppskot til hugvekjandi samrøðu. Ikki er neyðugt at taka allar spurningarnar við í viðgerðina.

*Anne Schjelderup hevur endurgivið søguna úr Gamla Testamenti við egnum orðum og tulkingum.  Hetta er sostatt ikki beinleiðis frásøgn úr Bíbliuni.*

## Bábelstornið

### *Tá øll menniskju í heiminum tosaðu sama mál*

Eftir at Nóa hevði bjargað dýrunum og familju síni undan at drukna í stóru vatnflóðini, gekk long tíð, áðrenn menniskju og dýr aftur floymdu á jørðini. Menniskjuni fóru úr eystri, har ørkin hjá Nóa varð strandað, og tey ferðaðust, til tey komu til ein breiðan dal í Sinears landi. (Sinear eitur Irak í dag. Í Gamla Testamenti æt staðurin Sinear, og í Nýggja Testamenti varð kann kallaður Mesopotamia). Øll heimsins fólk búðu í Sinear, og øll tosaðu sama mál. Tá var ikki sum í dag. Í dag eru fleiri túsund ymisk mál í heiminum.

Hevur tú nakrantíð ferðast í øðrum londum og hoyrt fremmand mál, sum tú als ikki skilir? Ella kennir tú kanska onkran, sum ikki dugir føroyskt? Tað er ørkymlandi ikki at skilja, hvat onnur siga, og tað er trupult at arbeiða saman, um vit ikki skilja hvønn annan. Eftir flóðina tosaðu øll í heiminum sama mál. Tá skiltu øll alt, sum hini søgdu, og øll kundu arbeiða saman og samstarva. Nú skulu tit hoyra, hvat hesi menniskjuni funnu upp á.

Tey høvdu funnið út av, hvussu tey kundu evna múrsteinar úr leiri og nýta jarðbik at seta teir saman. Soleiðis gjørdu tey stór hús, múrar, brýr, ja, tey dugdu at byggja næstan alt, og eingin endi var á uppfinnseminum hjá byggifrøðingunum í Sinears landi. Ein dagin fann onkur uppá at byggja ein bý, við einum torni, sum rakk heilt upp til himmals. Hann segði: “Tá fara vit at gerast kend og væl umtókt allastaðni har vit fara, og øll menniskju fara at hálova okkum.Vit fara at gerast sterkasta og máttmesta tjóð í øllum heiminum.” Hetta ljóðaði væl, hildu tey, so nú bara var at byggja.

Tey arbeiddu saman, roknaðu vinklar og bygdu sum fyri lívinum. Býurin gjørdist størri og størri, hábærsligari og hábærsligari. Eisini tornið miðskeiðis í býnum vaks og vaks.

Ein dagin hugdi Gud niður á jørðina og sá, hvat menniskjuni vóru í ferð við at gera. Hann sá býin og sá tornið, men honum dámdi als ikki tað, hann sá. Menniskju hugsaðu bara um seg sjálvi. Tey vildu vera best, sterkast og størst. Tey høvdu gloymt Gud, og høvdu ongan áhuga í at hjálpa øðrum.

Gud gjørdi av at steðga teirra ætlanum um at gera heimsins flottasta bý við heimsins hægsta torni. Meðan tey arbeiddu og tosaðu og saman um, hvussu býurin skuldi síggja út, gjørdi Gud nakað løgið. Hann broytti teirra tungumál. Brádliga tosaðu tey ikki sama mál. Byggifrøðingarnir kundu ikki biðja arbeiðsmenninar gera hetta og hatta, tí eingin skilti tað teir søgdu. Arbeiðsmenn, sum vóru í ferð við at laða ein garð, royndu at samstarva, men tað bar als ikki til:

- Yasin rópti “Rætt mær múrsteinin”. Nisar svaraði: “Ha, hvat sigur tú?” Yasin skilti ikki, hvat Nisar segði, so hann rópti uppaftur harðari: “Rætt mær múrsteinin!” Nisar gjørdist illur og segði: “Hví tvætlar tú so? Eg skilji ikki petti av tí tú sigur!” Akkurát tá kom arbeiðsformaðurin framvið. Hann hevði at teimum og spurdi: “Hví arbeiða tit ikki?” Yasin og Nisar svaraðu í senn á hvør sínum máli: “Ha, hvat sigur tú?” Tá skiltu teir allir tríggir, at teir als ikki skiltu nakað.

Soleiðis var skilið allastaðni. Eingin skilti nakað og ruðuleiki valdaði. Ikki var annað at gera enn at finna saman við teimum, sum tosaðu sama mál, og flyta úr tí vakra býnum við tí høga torninum. Soleiðis vóru menniskjuni spjadd út um allan heimin. Gud kallaði staðin, har hetta hendi, Bábel, tí tað merkir "staðurin, har málsligur ruðuleiki ræður."

## Uppskot til hugvekjandi samrøður

1. Í hesi søguni lesa vit, at fólk noyðast at skilja hvønn annan, um tey skulu byggja ein bý ella eitt torn. Eru aðrar støður, har tað er alneyðugt at skilja, hvat hini siga? Hvussu er í skúlanum? Kundu vit gingið í einum skúla, har eingin skilti, hvat lærarin segði? Kundu vit lært nakað úr skúlabókum, hóast tær vóru skrivaðar á einum fremmandum máli? Um ja, hvat?

2. Er altíð neyðugt at skilja, hvat onnur siga? Nær hevur hetta týdning:

   - Tá ið vit súkkla.
   - Tá ið vit spæla ein fótbóltsdyst ella annan ítrótt.
   - Tá ið vit skulu gera reglur fyri eitt nýtt spæl
   - Tá ið vit møta onkrum í bussinum, sum vit kenna
   - Tá ið vit skulu keypa í handlinum
   - Tá ið vit skulu geva ella fáa eina gávu
   - Tá ið vit siga onkrum farvæl
   - Tá ið vit skulu vísa onkrum, hvussu góð vit eru við tey

   Líkjast dømini, har málið *ikki* hevur týdning? Um ja, hvussu? Líkjast tey dømini, har málið *hevur* týdning? Um ja, hvussu?

3. Hvat merkir tað, at vit tosa eitt "mál"? Noyðist mál altíð at verða tosað ella skrivað? Vit vita, at nógv dýr samskifta við ymiskum ljóði. Tey kunnu t.d. belja ella goyggja, men dýr brúka nógv kropsmál, tá tey samskifta. Tey sum eiga hund vita, nær hann er glaður, illur ella bangin. Kunnu vit menniskju samskifta við kropsmáli? Kenna tit nøkur dømi um hetta?

4. Hvør av hesum eginleikum hevur størstan týdning fyri teg?

   - at brúka og skilja orð millum manna

- at brúka og skilja orð, sum eru í skrift
- at gera og skilja ljóð
- at brúka og skilja kropsmál

Hava vit tørv á øllum hesum eginleikunum í senn? Høvdu vit verið menniskju, um vit ikki høvdu allar hesar eginleikarnar?

5. Gud skilti menniskjuni í fleiri smáar bólkar. Heldur tú, at lærarin hjá tær onkuntíð kundi hugsað sær at gjørt tað sama við flokkin, altso gjørt tað soleiðis, at nøkur heilt fá kundu tosa saman? Hevði verið minni gangur í flokkinum, um allir næmingarnir ikki skiltu hvønn annan? Hví, hví ikki?